## EG MEINI TAÐ

### »Tað kann ikki vera okkara trupulleiki!«



*Rakel Helmsdal skrivar:*

Í løtuni eru øll rakt av tí, ella hava verið ella fara helst at verða næstu dagarnar, - í hvussu so er pessimistarnir. Tað eitur influensa ella beinkrím. Vit ganga runt og hosta, snýsa og fýsa okkara virus út millum hvønn annan. Tað fer frá heimunum til arbeiðsplássini, til barnagarðarnar, til skúlarnar og aftur til heimini og so framvegis.

Og fyrr ella seinni hava vit brúk fyri lækna, tí tað varð til meira enn bara beinkrím. Kanska tí vit noyddust út fyri tíðina, ella bara ikki høvdu tol at gerast ordiliga frísk, áðrenn vit settu ferðina upp aftur.

Við 40 í fepri noyðist tú út í bilin (um tú hevur ein slíkan), ella í taxabilin (so tú ført smittað taxachaufførin eisini), og út til læknan, sum annars plagar at áleggja fólki at halda seg inni, tá tey eru so mikið sjúk. Ein tímas tíð í bíðirúminum at skifta um bakteriur og virus við hini neyðardýrini í somu støðu, ofta pinkubørn, ið næstan bara ana, so fyriløgst av fepri eru tey. Tá tú at enda sleppur til læknan, verður tú kanska sendur í røntguna ella á laboratoriið, ella í hvussu so er á apotekið, alt meðan tú framvegis hevur so nógvan fepur, at tú nóg illa skilir, hvat læknin sigur, og avgjørt ikki ert forsvarligur í ferðsluni. At biðja nakran koyra fyri teg, ber næstan ikki til. Makin er til arbeiðis og ommur og abbar ansa hinum krímsjúku heima, ella so liggja tey øll somul snýsandi og sveittandi í songini. Hevði tú ikki lungnabruna, áðrenn tú fórt heiman, er stórur møguleiki fyri, at tú ført tað á túrinum, og í hvussu so er hevur tú smittað eini fimmtíggju ólukkudýr á vegnum.

Hetta er ein løgin skipan. Ein skuldi hildið, at tað í veruleikanum snúði seg um, at fáa so nógv fólk so sjúk sum til ber uppá so stutta tíð sum gjørligt, - og eg sum helt, at sjúkrahúsverkið skuldi spara?

Yvirhøvur kenst tað ikki skilagott, at tað skal vera neyðugt hjá sjúkum fólki at fara at søkja sær læknahjálp sjálvi. Læknin er frískur, og átti at verið tann, ið fór út. Eg veit væl, at tað ikki eru kommunulæknarnir sjálvur, ið skulu brigslast fyri hetta. Teir eru ov fáir, arbeiðsbyrðan er longu ov stór, og tí hava teir fingið álagt hesa skipanina, men álvaratos. Hetta er burtur úr vón og viti! At noyðast at sleipa eitt smábarn við høgum fepri og t.d. hálsbruna út í storm og regn í ein kaldan bil (um tú hevur ein slikan). Ella t.d. um tú hevur eitt tímalønt arbeiði: Sjúkradagpening ført tú ikki uttan læknaváttan, men tú noyðist at fara til lækna og eini 2-3 onnur støð við øllum tínum fepri og sita og bíða at fáa pening, - og álvaratos, har man vera meira enn ein, ið hugsar, at tá tú kanst fara 3-4 ymisk støð í býnum fyri at fáa allar váttanirnar, ja, mundi tú so ikki eins væl kunna verið til arbeiðis?

Eg skal ikki lovprísa privatlæknaskipanum í øðrum londum, tí hon er dýr og ger mun millum rík og fátøk, men ein sannroynd er tað kortini, at har taka læknanir sær væl betur av tær enn í Føroyum. Teir hjúkla um kundar sínar, tí teir vilja helst ikki, at tey fara at nýta annan lækna. Teir geva sær góðar stundir at práta við teg í viðtaluni og koma beinanvegin rennandi alt samdøgrið, bilar tær so mikið, at tú ikki heldur teg til at fara út. At teir so skriva eina digra rokning á vegnum út aftur, kemst so ikki uttanum, og bert ein góð sjúkratrygging kann loyva tær at ringja eftir læknanum, tá á stendur.

Hvørgar skipanir eru framúrskarandi, men tað mátti borið til, at havt eitthvørt millum hesar báðar, tí vist er tað, at tað er ikki nøktandi at reka sjúk fólk av songini til at søkja læknahjálp, og avgjørt ikki nøktandi at hoyra svarið frá læknaskrivaranum, tá tú sigur, at títt barn er sera sjúkt, tú sjálvur hevur fepur, at tú ikki hevur bil og ikki hevur nakran at vera inni hjá hinum børnunum: "Tað kann ikki vera okkara trupulleiki!"

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 341800, telefax 341801,
teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro

# Journalistikkur er ein lívsstílur

- Eftir meira enn 30 ár innan fjølmiðlaheimin brennir tú sjálvandi út, og spyr teg sjálvan um tíðin ikki er komin til nakað annað. Men journalistikkur er ein lívsstílur, sigur Johnsigurd Johannesen, sum sigur seg vera smædnan av lyndi og skemtara til húsbrúk



*IN ACTION: Mr. Dagur og Vika. Johnsigurd Johannesen hevur seinastu átta árini verið fastur gestur í stovunum kring Føroya land meira enn túsund ferðir*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

PORTRETT

*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Hann er ímyndin hjá mongum føroyingum sum Mr. Dagur og vika. Klokkan 20, tá eyðkennislagið hjá Degi og viku fer í gongd, situr hann til reiðar handan upptøkutólið. Fattur og væl fyrireikaður, leiðir hann tann tíðindaáhugaða føroyingin ígjøgnum enn eina tíðindasending. Vit tosa sjálvandi um Johnsigurd Johannesen. Í meira enn 30 ár hevur hann starvast innan fjølmiðlaheimin. Bløð, útvarp og sjónvarp hevur hann fingist við, og eftir næstan 20 ár hjá Sjónvarpi Føroya, hevur hann sent yvir 1000 tíðindasendingar inn í stovurnar hjá Føroya fólki.

- Journalistikkur er ein lívsstílur. Tá eg komi heim, so fái eg ikki latið vera við at tendra útvarpið ella við at hyggja eftir eini tíðindasending. Eg eri ein tíðindanarkomanur. Um eg segði annað, so hevði eg logið, sigur Johnsigurd Johannesen.

### Frá barnsbeini

Áhugin fyri fjølmiðlunum hevur verið til frá barnsbeini.

- Eg havi altíð verið áhugaður í fjølmiðlunum. Heilt tíðliga visti eg, at hetta var leiðin, eg skuldi ganga, greiðir Johnsigurd frá, og minnist aftur á tíðina, tá hann skrivaði skúlablóð í barnaskúlanum og spældi útvarp við einum bandupptakara.

Fyrsta stigið inn í fjølmiðlaheimin var, tá sjónvarpsverturin og Jákup Nielsen fóru á realskúla. Tá byrjaðu teir at falsa (boyggja) bløð á Sosialinum. Og summarið 1972, tá teir vóru lidnir við realskúlan, vórðu teir settir í starv á Sosialinum sum blaðmenn, men við teirri treyt, at teir hildu fram við at falsa.

- Tá í tíðini vóru bløðini bara 6-8 síður. Mikudagsblaðið plagdi at vera seks síður og leygardagblaðið átta. Skrivað varð um alt millum himmal og jørð. Alt frá tíðindum úr løgtinginum til at týða søgur.

- Tað var avmarkað, hvussu nógv vit kundu gera burturúr, tí útgerðin var ikki so framkomin tá. Um tú skuldi hava eina mynd, so skuldu klichéir gerast, og so skuldi metast um, um blaðið hevði ráð til tess, minnist Johnsigurd. Hann sigur seg vera bergtiknan av tí stóru teknisku menningini á bløðunum, og at tað ber til at gera so tekniskt framkomin bløð í dag í mun til fyri bert 20-30 árum síðani.

### Á skúla

Á heystið í 1973 gekk leiðin so til Århus á Danmarks Journalisthøjskúla. Tá var hann 17 ára gamal.

- Eg haldi, at eg var har í eini átta mánaðir. Eg gavst, tí eg helt, at eg var ov ungur í mun til hini sum vóru har. Ætlanin var altíð at fara niður aftur, men tað gjørdist ongantíð til nakað.

So Johnsigurd vendi nøsini heim aftur til Føroya og aftur á Sosialin, har hann starvaðist til í januar 1977. Tá fór hann á Dagblaðið at arbeiða í knapt tvey ár, og síðani varð miðilin heilt skiftur út. Hesuferð vóru boð eftir tíðindamanninum hjá Útvarpi Føroya.

- Útvarp var ógvuliga spennandi. Tað at sleppa út við øllum beinanvegin, í mun til at bara koma út tvær ferðir um vikuna. Størsti munurin var eisini tað at koma út við tíðindunum upp til fleiri ferðir um dagin.

Johnsigurd minnist, at ein tann størsta uppgávan hann fekk, var beint sum hann var byrjaður. Løgtingsval hevði júst verið, og hann skuldi tí at fylgja landsstýrissamráðingunum.

### Skemtari til húsbrúk

Tíðindaverturin hevur tó ikki bert hildið seg innan tíðindavinnuna. Hann hevur eisini gjørt eitt legg inn í skemtiheimin, tá skemtisendingarnar hjá V4 vóru í hásætinum.

- Eg dugdi at herma eitt sindur, og var so við í einstøkum skemtisendingum. Vit plagdu at vera úti við V4, tá Oskar Hermansson og Olivur Næss vóru vælmaktini, greiðir Johnsigurd frá.

Men undirhaldið er nú lagt á hillina.

- Tað var stuttligt tá, og tað er nakað, sum eg ikki hevði viljað verið fyri uttan. Men nú skemti eg bara til húsbrúk, um eg so má siga.

Johnsigurd heldur ikki, at hann hevði tikið tað uppaftur, um møguleikin beyðst.

- Tíðin er farin frá tí slagnum av skemti, sum vit høvdu tá. Tað hevði ikki gingið nú, men tað var fint tá.

### Frá skemti til sjónvarp

Eftir útvarpið og skemtisendingarnar hjá V4, fekk Johnsigurd starv hjá Sjónvarpi Føroya, har hann starvast enn tann dag í dag.

- Eg havi fingist mest við tíðindi í sjónvarpinum. Eg havi ikki gjørt nógvar stakar sendingar. Tíðindini eru tað, sum hevur hóskað best til mín og mítt temperament, og tað er sjálvandi fyrst og fremst Dagur og vika.

Men debuttin á sjónvarpsskíggjanum gjørdist ikki fyrr enn fleiri mánaðir eftir, at hann varð byrjaður.

- Eg vildi ikki á, fyrr enn eg var tryggur við skermin. Eg vildi hava góða tíð til at seta meg inn í sjónvarpsteknikkin.

Í fyrstuni vóru tað fleiri sjónvarpsvertir, sum skiftust um at lesa tíðindini í Degi og viku, men í 1995 varð leisturin lagdur um til, at tveir fastir vertir vóru, og Johnsigurd gjørdist annar. Tí hevur hann verið rættiliga nógv á skíggjanum, og bara seinastu átta árini hevur Johnsigurd lisið meira enn 1000 Dagar og Vikur.

### Fyrireikast væl

- Tú mást hava ein professionellan hugburð mótvegis hyggjarunum, og tí leggi eg stóran dent á at fyrireika meg væl. Ein hálvan tíma, áðrenn Dagur og vika fer í luftina, fer oman í studio at tendra upptøkutólið, promptara og gongur tað ígjøgnum, sum skal sendast.

- Hetta geri eg enn. Tað skal út í hvørja stovu í Føroyum. Eg lesi tað ígjøgnum og royni at leggja áherðslu á tey røttu orðini og at hava mimikkin í lagi. Men alt kann ganga galið, og tað kann tað eisini hjá einum royndum tíðindaverti.

- Tað er ymiskt, nær tey ymsu innsløgini eru liðug. Viðhvørt hevur eitt tíðindafólk verið úti í markini, og kemur seint aftur. Tá er man onkuntíð komin til at siga okkurt skeivt til innslagið. Og so eru sjálvandi eisini tær tekniska umstøðurnar, sum ein ikki er harri yvir. Tá er onki annað at gera enn at siga tað, sum skal sigast.

### Tekniskt afturúrsiglt

Johnsigurd heldur, at sjónvarpið er komið ov stutt tekniskt.

- Sjónvarpið fyllir 20 ár næsta ár, men á bløðunum menningin verið nógv skjótari. Tað ber framvegis ikki til hjá okkum at fáa myndir úr til dømis Suðuroy í eini handavending. Vit skulu framvegis reint fysiskt hava eitt band.

- Sjónvarpsarbeiðið er spennandi, men eg sakni hasa teknisku menningina. Tað er framvegis ov tungt at fáast við. Um tann tekniska síðan hevði verið útbygd, so høvdu vit eisini fingið meira tilfar at arbeiða við.

Men stovnurin er meira enn dupult so stórur nú, sum tá Johnsigurd byrjaði.

- Tá eg byrjaði, vóru vit eini 14 fólk tilsamans. Við vaskikonum! Men nú eru vit eini 50. Tá skuldi tú fylla meira í hvørt innslag, og sendingin gjørdist tískil kanska meira dreivut, men hyggjaranum dámdi væl at fáa sjónvarpstíðindi á føroyskum. Tann størsti munurin millum fyrr og nú er, at vit vóru færri fólk.

### Brennir út

Eftir meira enn 30 ár í fjølmiðlaheiminum er spurningurin, um ein ikki brennir út, upplagdur:

- Jú, sjálvandi gert tú tað. Tú spyrt ofta teg sjálvan, um tíðin ikki er komin til annað, men eg veit ikki um eg kann brúkast til nakað annað.

Men tíðindanarkomanur er so nakað, sum hann heldur seg altíð fara at vera.

- Eg uppfati ikki meg sjálvan sum ein ambitiøsan persón. Vildi heldur sagt, at eg eri smæðin av lyndi. Eg havi verri við at taka orðið í eini lítlari samkomu uppá eini 20-30 fólk, enn eg havi tað, tá eg skal sita handan upptøkutólini

At verða tíðindamaður tekur eisini nógva tíð, og tað kann stundum gerast ringt, at fáa alt at passa saman.

- Tað skal nógv tíð til og nógvar skeivar arbeiðstíðir, sum skulu passast saman við familjulívið, men tað hevur eydnast. Og við meira enn 30 árum innan fjølmiðlaheimin, skemti og eini ímynd av Mr. News í kuffertinum, so siggja vit helst Johnsigurd aftur í fjálgu stovum okkara okkurt kvøldið klokkan 20 í vetur.